HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

Falkavegur 6, 2. hædd
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. +298 35 64 00
Fax. + 298 35 64 01
E-mail: hfs@hfs.fo
www.hfs.fo

FOOD, VETERINARY AND ENVIRONMENTAL AGENCY

# Kemikari

Kemiska kanningarstovan søkir eftir einum kemikara til eitt avloysarastarv.

**Starvslýsing**
Tú skalt vera við til at menna og stovnseta kanningarhættir innan umhvørivs- og matvøruøkið og tryggja, at kanningarnar eru í samsvari við akkrediteringina. Spurningar viðvíkjandi kemiskum evnum, trupulleikar við kemiskum tólum og kemiskum greiningum verður eisini ein partur av tínum uppgávum, eins og tú skalt verða við til at dagføra og víðarimenna góðskuskipanina.

**Krøv til útbúgving og kunnleika**
Tú skalt hava lokið prógv sum cand. scient, akademi- ella sivilverkfrøðingur í evnafrøði. Tú skalt helst hava kunnleika til nútímans evnafrøðilig tól og hava kunnleika um góðskustýring og hagfrøðiligar hættir.

Góður kunnleiki krevst til framkomnar EDV skipanir. Tú skalt hava góð samstarvsevni, vera nærlagdur/nærløgd og duga at arbeiða miðvíst og sjálvstøðugt.

Umsøkjarar við starvsroyndum hava fyrimun.

Tað er ein fyrimunur, um tú hevur koyrikort.

**Tíð- og setanarviðurskifti**
Starvið er fyri tíðarskeiðið mai 2006 til 31. mars 2007; avtala kann gerast um fyrsta starvsdag.

Starvið verður sett sambært sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið, sí www.lnd.fo

**Umsóknin**
Umsóknir til starvið, við avriti av prógvum og viðmælum, skal vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin hin 20. apríl 2006.

**Kemiska kanningarstovan**
À kemisku deildini starvast íalt 6 fólk.

Kemiska kanningarstovan er altjóða góðkend kanningarstova (sí www.danak.dk akkr.nr.: 303). Kanningar og sýnissløg fevna víða. Arbeiðsøkið hjá kemisku kanningarstovuni er m.a. tengt at løggildingum innan matvøruframleiðslu og umhvørvisgóðkenningum. Serliga er talan um kanningar av drekkivatni, framleiðsluvatni, spillivatni, svimjihylsvatni, mold, grasi, fiski og fiskaúrdráttum.
Nógv av hesum hevur samband við høvuðsvinnu okkara, fiskivinnuna. Men eisini kommunur og dálkandi virki hava nógv samskifti við kanningarstovuna.
Kemiska kanningarstovan bjóðar seg eisini fram innan sýnistøku á sínum virkisøki.

Lýsingin er eisini at síggja á heimasíðuni hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni, www.hfs.fo, har tú eisini kanst finna tær fleiri upplýsingar um stovnin, deildina og virkisøkið, sum heild.

Fleiri upplýsingar um avloysarastarvið fáast við at venda sær til Rikke Berg Larsen, deildarleiðara, ella Bárð Enni, stjóra, á tlf. 356400.



**Kunngerð**

**Kapellið í Kirkjugarðinum við Velbastaðvegin**

Kapellið verður afturlatið í tíðarskeiðinum frá 5. apríl til 21. juli 2006 vegna høvuðsumvæling.

Tórshavnar kommuna



www. Sosialurin .fo

# Lýsing frá Vágs Havn

Allir teir sum hava órudd liggjandi á økinum inni á Oyrunum verða bidnir um at beina tað burtur áðrenn 1. mai 2006.

Tað sum ikki er beint burtur nevnda dag verður beint burtur fyri eigarans rokning.

**Vágs Havn**



Les Sosialin so ert tú við

# Studentaskúlin og HF-skeiðið í Eysturoy og Klaksvíkar HF-skeið

Treytað av góðkendum undirvísingarvirksemi verða – alt eftir lærigreinasamanseting – frá 1. august 2006 **4-7 størv** sum, adjunktur/lektari leys at søkja í hesum lærugreinum:

**Alisfrøði, donskum, enskum, føroyskum, ítrótti, latín, miðlakunnleika, sponskum, støddfrøði, søgu og tónleiki.**

Harumframt eru **2 ársvikariat** leys í lærugreinunum:

**Donskum og føroyskum** (møguliga saman við lærigrein nevnd omanfyri)

Umsøkjarar skulu tilskila, í hvørjum lærugreinum (høvuðsgrein, hjágrein ella annað), teir hava undirvísingarførleika og um teir hava námsfrøðiliga útbúgving. Umsøkjarar, ið ikki hava námsfrøðiliga útbúgving, og sum verða settir, skulu í august mánaði taka námsfrøðiligt innleiðsluskeið, sum Mentamálaráðið skipar fyri.

Skúlin fer í tilmæli sínum um setan í fast starv at leggja dent á, at umsøkjararnir hava kunnleika til føroyskt mál og føroysk viðurskifti, og um teir ikki hava tað, í hvønn mun teir eru sinnaðir at ogna sær innlit og vitan um hetta. Harumframt fer skúlin at leggja dent á, at umsøkjarar virknir fara at taka lut í menningini av einum góðum námsfrøðiligum skúlaumhvørvi, har samstarv, nýggir arbeiðshættir og KT eru týðandi tættir.

Umsøkjarar kunnu fáa meiri at vita um endamál skúlans við at venda sær til leiðslu skúlans ella við at vitja heimasíðu skúlans: www.shey.fo

Starvssetanin verður sambært sáttmála millum Yrkisfelag studentaskúla- og HF-lærara (YF) og Fíggjarmálaráðið. YF-umsóknarbløð fáast frá Yrkisfelagnum ella frá skúlanum
tlf. 44 40 24, fak 44 47 97.
Umsóknin skal **stílast til** rektaran, og **sendast til**

**Studentaskúlan og HF-skeiðið í Eysturoy**
att.: Sámal í Skorini, rektara
Kambsdalur, 530 Fuglafjørður

í seinasta lagi **26. apríl 2006.**

Avrit av prógvum ella úrskrift úr próvtøkubók skal sendast saman við umsóknini. Setanarsamrøður verða fyrst í mai.

# Arbeiði

Arbeiðið at stoypta ein betonggarð/múr fram við Stórá í Sumba verður hervið boðin út.

Nærmari upplýsingar fáast við at venda sær til Sumbiar kommunu á tlf. 370344 ella 570538.

Tilboðini skulu vera kommununi í hendi 19. apríl 2006, og tilskilar sær rætt til at taka av onkrum av tilboðunum ella at vraka tey øll.

**Sumbiar kommuna**